# Sernám

Høvuðsuppgávan hjá Sernám er at veita sernámsfrøðiliga ráðgeving, vegleiðing og stuðul, soleiðis at børn og ung (0-18 ár) kunnu styrkjast í menningini, sum umfatar sosiala, kroppsliga, persónliga, málsliga og kognitiva menning.

# Hvør eri eg?

- Fríðbjørg Hammer
- Talu- og lesiráðgevi hjá Sernám, 2014-2015
- Lærari, útbúgvin í 1997
- Serlærari útbúgvin í 2012
- Formaður í skúlastýrinum á Trøðni
- Foreldur

# Lógarheimildir

- **§ 2.** Uppgáva fólkaskúlans er við atliti at tí einstaka næminginum og í samstarvi við foreldrini at fremja, at næmingarnir nema sær kunnleika, fimi, arbeiðshættir og málbúnar, sum stuðla tí einstaka næminginum í fjølbroyttu, persónligu menningini.

- § 4. *Stk. 5.* 2 Sernámsfrøðilig ráðgeving verður veitt skúlum, foreldrum og øðrum, ið varða av næmingum í fólkaskúlanum. Næmingar, ið hava tørv á serligum tiltøkum, ella sum ikki fáa nøktandi úrslit í vanliga undirvísingartilboði skúlans, fáa serundirvísing og/ella sernáms-frøðiligan stuðul.

- *Stk. 6.* 2 Landsstýrismaðurin kann veita børnum, ið enn ikki hava byrjað skúlagongdina, sernáms-frøðiligan stuðul. Somuleiðis verður sernámsfrøðilig ráðgeving veitt foreldrum og øðrum, ið varða av hesum børnum.

Fólkaskúlalógin

# Ymisk tilmæli og royndarvekætlanir

- Tilmæli um sernámsfrøði,2001
- Fólkaskúlaráðið, nýtt tilmæli við serligum atliti til serøkið í fólkaskúlanum, 2011
- Upprit um Førleikastovur, bygdi á omanfyrinevnda tilmæli, 2012 og sett í verk sama ár.
- Tænastueindirnar (NSR, nú Sernám - ) fyribils settar á stovn í 2007 (Eingin formlig avtala millum land og kommunu)
- Ítøkilig amboð, men kunngerðir og mannagongdir, um hvussu samstarvið við tænastueindirnar og Sernám eigur at vera skipað, vænta.

Tilmæli um sernámsfrøðiliga økið innan fólkaskúlaøkið

# Sernám

## Fyribyrgjandi arbeið

- Sernám arbeiðir saman við stovnum og skúlum fyri, so tíðliga sum til ber at skapa best møguligar umstøður fyri menning hjá børnum og ungum.

  Vit skipa fyri felags tiltøkum, so sum sertoymisfundum, skeið í málmenning, tekn til talu, alternativum samskifti og byrjunarundirvísing í lesing.

  Vegleiðingin tekur støði í m.a. TRAS, SPU, lesi-/roknikanningum og eygleiðingum.

  Harumfram skipar Sernám fyri regluligum sernámsfundum á stovnum og skúlum.

www.sernám.fo

## Útgreinan og viðgerð

- Har fyribyrgjandi arbeiði ikki røkkur er neyðugt við tilmelding til Sernám.

  Málsviðgerðin fer fram millum Sernám og stovn / skúla, familju, bólkar, flokkar, tað einstaka barnið ella onnur.

  Hetta arbeiði kann snúgva seg um eygleiðingar, kanningar, samrøður og/ella viðgerð.

  Talan kann vera um bæði bólkar og einstaklingar.

www.sernám.fo

# Arbeiðsøkið

- Øll børn frá 0-18 ár
- Talu
- Hoyrn
- Fysio- og ergoterapi
- Námsfrøði
- Sálarfrøði
- Lesing

# Tilmeldingar

Foreldur og stovnur/skúli tilmelda barnið í felag.

Onnur kunnu tilmelda í samráð við foreldur, so sum heilsusystur ella lækni.

Foreldur kunnu tilmelda sjálvi.

# Tá tilmeldingin er komin

- Tilmeldingin verður viðgjørd á visitatiónsfundi.
- Avger verður tikin um hvør fakbólkur skal taka málið.
- Skriv verður sent til foreldur og stovn – um hesin hevur tilmeldað saman við foreldrunum.

# Nær og hvar verður hjálpin veitt?

- Bíðilistin:
- Hetta er ymiskt frá barni til barn.
- Atlit verða tikin til barnið.
- Hvørt fakøki sín bíðilista.
- Samstarv millum fakbólkarnar.
- Leiðslan hevur ábyrgd av bíðilistunum.

# Nær og hvar verður hjálpin veitt?

- Eyðleiðing fer fram á stovnum/skúlum og inni á Sernám
- Kanningar og afturmeldingar verða sum oftast gjørdar inni á Sernámi, men eisini úti á stovnunum/skúlunum.
- Taluundirvísing verður givin har sum barnið er

# Sernám og Førleikastovurnar

- Eitt ávíst samstarv er millum Førleikastovurnar og Sernám. Ymsar uppgávur eru lagdar út frá Sernám inn á Førleikastovurnar, so sum lesikanningar í 1.-4. flokk (2. – 5. fl)
- Sernámsfundir verða skipaðir
- Ætlanin er at flyta t.d. orðblindakanningar  út á skúlarnar at gera. DVO
- Annars samstarv eftir tørvi

# Førleikastovan

- Er undir leiðslu skúlans
- Samskipa tímar og innihald vegna serligan tørv og miðfirrað serundirvísing
- Menna undirvísingarhættir
- Faklig upplegg, foreldrafundum og námsfrøðiligum fundum
- Gera lesi- og roknikanningar
- Tryggja at einstaklingalæruætlanir verða gjørdar fyri næmingum við serligum tørvi

Tilmæli um sernámsfrøðiliga økið innan fólkaskúlaøkið

# Førleikastovan, framhald

- Næmingalaga, ráðgeva og eftirmeta í mun til innihaldið í læru og menningartilgongdini hjá næmingum við serligum tørvi m.a. Viðvíkjandi ársætlan og einstaklingalæruætlan
- Raðgeva og veita hjálp viðvíkjandi inklusjón
- Tilfar, evt. Tillaga tilfar
- Einstaklings fakligar royndir
- Menna námsfrøðiliga umhvørvi í skúlanum at kunna og samskifta við foreldur

Tilmæli um sernámsfrøðiliga økið innan fólkaskúlaøkið

# Førleikastovan, framhald

- Førleikastovan er eitt tvørfakligt toymi
- Serlærari er formaður/kvinna
- Lesivegleiðari er skrivari
- Leiðsla og AKT-lærari
- Onnur kunnu verða: orðblindalærari, støddfrøðivegleiðari, skúlavegleiðari, skúlabókavørður, KT-vørður, flokslærarar, cand.pæd.pæd.psyk., heilsusystur og onnur eftir tørvi

Tilmæli um sernámsfrøðiliga økið innan fólkaskúlaøkið

# Førleikastovan, framhald

- Hvar gongur markið í mun til arbeiði hjá Førleikastovunum og Sernám?
- Hvussu er samstarvið millum Sernám og skúlarnar/stovnarnar?

# Um barnið flytir skúla, hvat so?

- Um næmingur, ið er partur av tímatillutanini til tímar vegna serligan tørv, flytir skúla, skulu skúlarnir senda avrit av flytingarskjalinum til Sernám. Sum meginregla fylgir tímatillutanin næminginum.

Sernám

- Ein góð søga

# Takk fyri meg